# Eg havi verið fermur

Eg havi verið fermur og ungur
*– so fagurt tá fullu mær rím –*
nú eri eg gamal og stirvin og tungur
*– so fer alt á foldum.*

2. Fyrr leikti eg lættur um fjøll og skor
*– so fagurt tá fullu mær rím –*
nú tyngist í hvørjum mítt fótaspor
*– so fer alt á foldum.*

3. Fyrr dámdi mær harðan seyðarakstur
*– so fagurt tá fullu mær rím –*
nú hevði eg skjótt verið fyrilagstur
*– so fer alt á foldum.*

4. Fyrr róði eg fróur á Vágahavið
*– so fagurt tá fullu mær rím –*
nú hevði tað verið nógv, nógv ov strævið
*– so fer alt á foldum.*

5. Fyrr kundi eg væl mítt hvalvákn stýra
*– so fagurt tá fullu mær rím –*
nú hongur mín grindaknívur í slíðra
*– so fer alt á foldum.*

6. Fyrr dámdi mær harðan grindaróður
*– so fagurt tá fullu mær rím –*
nú hevði eg skjótt verið pøstur og móður
*– so fer alt á foldum.*

7. Fyrr var eg við líggjanum kringur á bøi
*– so fagurt tá fullu mær rím –*
nú eri eg raskast í mussaskøði
*– so fer alt á foldum.*

8. Fyrr seig eg fúsur í lundalandi
*– so fagurt tá fullu mær rím –*
nú tori eg ikki í lesningsbandið
*– so fer alt á foldum.*

9. Fyrr mettist eg javnt við rættar menn
*– so fagurt tá fullu mær rím –*
nú orki eg einans at røra mín penn
*– so fer alt á foldum.*

10. Tó kann eg væl vera glaður og fróur
*– um trek nú falla mær rím –*
eg veit, mær fylgir mín faðir góður
*– um alt fer á foldum.*

11. Og má eg missa so mangan gleim
*– og enda so her míni rím*
hann tekur meg burt til eitt betri heim
*enn finnist á foldum.*

Mikkjal á Ryggi yrkti. Lagið er Stolt Signhild